# Støðug útbygging av Fuglafjarðar skúla

**- Vit hava eina útbyggingarætlan, sum røkkur yvir eini 15 ár, og ætlanin er at brúka einar 3 milj. krónur til skúlan um árið, sigur Sigurd Simonsen, býráðsformaður**

KOMMUNUMÁL
*Vilmund Jacobsen*

Fuglafjarðar kommuna hevur serliga sett ljóskastran á trý mál seinastu 2-3 árini. Størstu íløgurnar eru í hesum tíðarskeiði farnar til havnalagið, útstykkingar og til skúlan – stívliga 2 milj. krónur til hvørt av hesum málum. Íløgukarmurin hjá kommununi er umleið 6,5 milj. kr. og kann í besta føri vera 7,5 milj. kr.

### Støðug útbygging

Sigurd Simonsen, býráðsformaður í Fuglafirði, sigur, at skúlin er undir støðugari útbygging. Hetta er triðja árið á rað, at skúlin verður útbygdur.

- Vit hava bygt ein 700 fermetra stóran bygning í tveimum hæddum á skúlaplássinum niðanfyri skúlan. Hesin parturin er bara ætlaður til ymiskar serstovur, sigur hann.

### Vanligar stovur

Býráðsformaðurin vísir á, at longu nú er skúlin í uppisetri við vanligar skúlastovur, og tí verður neyðugt at halda fram við einum bygningi aftrat til vanligar skúlastovur.

- Vit hava gjørt eina ætlan um, hvussu skúlin í Fuglafirði skal útbyggjast. Henda ætlan røkkur yvir eini 15 ár, og vit miðja eftir at brúka einar 3 milj. krónur um árið til skúlan, sigur Sigurd Simonsen.



*Trongt hevur verið í skúlanum í Fuglafirði, men nú verður skúlin so støðugt útbygdur næstu árini – fyrst við serstovum og síðan við vanligum skúlastovum. Myndin er tikin fyri útbyggingina, sum nú er í gongd.*

*Mynd: Edvard Joensen*

# Byggja røktar og ellisheim fyri økt skattaprosent

**Fuglafjarðar kommuna hevur økt skattaprosentið við einum prosenti, úr 18,9 í 2002 uppí 19,9 í 2003. Meirinntøkan verður oyramerkt til bygging av einum røktar-og ellisheimi í Fuglafirði**

ELDRAØKIÐ
*Vilmund Jacobsen*

Fuglafjarðar kommuna telist millum tær kommunur, sum vilja gera nakað ítøkiligt fyri tey gomlu og avlamnu. Nøkur ár herfyri læt kommunan byggja eitt eldrasambýli, og í fjør varð eisini kjallarin í sambýlinum innrættaður, soleiðis at pláss er fyri fleiri fólkum. At kalla alt arbeiði er gjørt av fólki hjá og í kommununi – heilt frá tekniborðinum til tað hugnaliga og snotuliga býlið, ið nú er karmur um tilveruna hjá teimum gomlu, sum búgva har.

### Økt skattaprosent

Við hátíðarløtuna, tá ið kjallarin alment varð tikin í nýtslu, segði býráðsformaðurin í Fuglafirði, Sigurd Simonsen, at kommunan eisini hevur ætlanir um at byggja eitt ellis-og røktarheim í Fuglafirði.

- Vit umhugsa at hækka skattaprosentið við tí endamáli at byggja eitt ellis-og røktarheim, segði hann.



*- Vit vænta, at ellis-og røktarheimið kann byggjast fyri minni enn eina milj. krónur fyri hvørt búfólk, sigur Sigurd Simonsen.*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Og tað er hetta, sum kommunan nú hevur gjørt.

- Skattaprosentið er økt úr 18,9 í 2002 uppí 19,9 í 2003. Inntøkan av hesum prosentinum verður oyramerkt til bygging av ellis- og røktarheiminum, sigur býráðsformaðurin.

Hann vísir á, at byggingin við hesum verður løgd uttanfyri íløgukarmin hjá kommununi.

### 20 búfólk

Ætlanin hjá Fuglafjarðar kommunu er at brúka einar 10 milj. krónur trý tey næstu árini til hesa bygging. Síðan væntar kommunan, at landið kemur við øðrum 10 milj. krónum til endamálið.

- Málið er soleiðis at byggja eitt ellis-og røktarheim fyri einar 20 milj. krónur, har pláss í fyrsta lagi verður fyri 20 fólkum, sigur Sigurd.

Royndirnar av at byggja Vesturstovu, sum eldrasambýlið eitur, eru tó so góðar, at býráðsformaðurin væntar ikki, at kostnaðurin av ellis- og røktarheiminum verður 1 milj. krónur fyri hvørt búfólk, ið annars er vanligt, tá ið slík bygging fer fram.

Umsókn er send myndugleikunum um at hjálpa til við byggingini, og Sigurd Simonsen heldur, at landsmyndugleikarnir áttu at fegnast um, at kommunur taka slík stig, sum Fuglafjarðar kommuna í hesum førinum hevur gjørt.

Ætlandi verður ellis-og røktarheimið í Fuglafirði bygt úti á vestara landinum.

- Verður spakin settur í eftir summarfrítíðina, sum ætlanin er, klára vit at brúka tann peningin í ár, sum fellur til hesa bygging, sigur hann.

### Ikki við

Nú ellis-og røktarheimið í Runavík, sum kommunur í Eysturoy eru saman um, verður útbygt, tekur Fuglafjarðar kommuna ikki lut í hesi útbygging.

- Vit fara at brúka sama leist hesaferð, sum við øðrum kommunalum byggingum her í kommununi seinastu árini. Vit fara at tekna húsið á teknistovuni hjá kommununi og gera alt sjálvir, sum vit nú einaferð eru førir fyri. Á henda hátt vænta vit, at ellis-og røktarheimið kann byggjast fyri minni enn eina milj. krónur fyri hvørt búfólk, sigur Sigurd Simonsen, býráðsformaður, at enda.



*Eftir summarfrítíðina verður spaki settur í til ellis-og røktarheim í Fuglafirði. - Vit fara at brúka sama leist hesaferð, sum við øðrum kommunalum byggingum her í kommununi seinastu árini, sigur Sigurd Simonsen, býráðsformaður.*



# Vit kunnu læra nógv av málinum um landsantikvarin

**Viðurskiftini ímillum landsstýrið og almenn starvsfólk eru ikki nóg greið, heldur Starvsmannafelagið**

LANDSANTIKVARUR
*Áki Bertholdsen*

– Viðurskiftini ímillum almenn starvsfólk og Landsstýrið, eru ikki nóg greið.

Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum, heldur at tað er í hvussu so er ein lærdómur, sum vit kunnu fáa burturúr málinum um landsantikvarin.

Og tað er, hvussu stóran týdning tað hevur at hava greið viðurskifti ímillum arbeiðsgevara og starvsfólk.

– Stóri trupulleikin er, at starvsfólkaviðurskifti og sáttmálaviðurskifti hoyra undir hvør sín landsstýrismann. Fíggjarmálaráðiarrin umsitur sáttmálaviðurskiftini og Løgmaður umsitur starvsfólkaviðurskiftini.

– Hetta elvir til stórar trupulleikar, tí tað ger tað ringt at hava samanhang í øllum teimum viðurskiftum, sum eru ímillum eitt starvsfólk og Landsstýrið.

Hann heldur tí, at tað einasta rætta er, at sáttmálaviðurskifti og starvsfólkaviðurskifti verða løgd undir sama landsstýrismann, tí so er øll ábyrgdin savna á einum staði.

Um tað so skal vera undir løgmanni ella undir landsstýrismanninum í fíggjarmálum, hevur minni at siga fyri hann.

– Hann sigur, at Starvsmannafelagð hevur roynt at fingið hesi viðurskifti í rættlag og hann veit onki um, at tað er tann stóran mótstøðan ímóti tí, heldur ikki frá landsstýrinum.

– Tað hendir bara onki.

Hann vísir eisini á, at tey eru mong, sum hava funnist at bygnaðarbroytingunum, sum Finn Normann Christensen skipaði fyri í almennu umsitingini.

– Tey kunnu teljast á einari hond, sum taka undir við teirri skipanini og tey eru mong, sum hava ætlað at broyta hana, men tað hendir bara onki.



*– Tað at alt ikki liggur undir sama hatti, er ein storur trupulleiki og tað ma halda uppat*

### Taka upp í samráðingar

Gunnleivur Dalsgarð sigur, at nú sáttmálasamráðingar verða aftur í heyst, fer Starvsmannafelagið at royna at taka spurningin um viðurskiftini ímillum starvsfólk og landsstýrið upp í samráðingunum fyri at fáa øll starvsfólkamál undir sama landsstýrismann fyri at fáa greið viðurskifti á økinum.

Tað itøkiliga málið um landsantikvarin hevur hann ikki so nógvar viðmerkingar til.

– Tað er ikki eitt mál, sum liggur undir Starvsmannafelagnum. Eg kann bara vísa til tær almennu viðmerkingar, sum starvsfólkið á Fornminnissavninum hevur havt um málið.

– Tey hava gjørt sínar viðmerkingar og teimum taka vit fult undir við.

Annars heldur hann, at setanarpolitikkurin er orðingar um, hvussu tað eigur at vera farið fram, tá ið fólk verða sett í starv. Men tað eru ikki avgjørdar orðingar og tí er mangan trupult at siga, nær setanarpolitikkurin er brotin ella ikki, sigur Gunnleivur Dalsgarð, men hann leggur dent á, at við hesum hugsar hann ikki serstakt um landsantikvarin.

– Men av tí at sáttmálaviðurskifti og starvsfólkaviðurskifti annars, liggja undir hvør sínum landsstýrismanni eru starvsfólkaviðurskifti og setanarpolitikkur orðingar uttan nakrar bindingar og tí má hetta halda uppat, sigur Gunnleivur Dalsgarð.

Meira um málið á síðu 18.

# Hugsunardagurin 22. februar

Hugsanardagur er tann 22. februar. Dagurin verður hildin av skótum kring allan heimin til minnis um hjúnini Baden- Powell, ið bæði høvdu føðingardag tann 22. februar.

Á enskum verður hesin dagurin nevndur »Thinkingday« ella »World friendship day«, tí á hesum degi hugsa vit um skótavinir okkara kring allan heim.

Eisini ber til at senda skótum og øðrum eitt »Hugsanardagskort« við eini skóta heilsan í hesum sambandi.

Í samband við hugsanardagin hevði Føroya Skótaráð eina teknikapping millum allar skótar í Føroyum. 4 tær bestu tekningarnar vunnu eina virðisløn, sum verður handa til vinnararnar á sjálvum hugsanardegnum. Umframt virðislønina, so eru tekningarnar sum vunnu teknikappingina gjørdar til »Hugsanarsagskort«.

Í samband við at hugsanardagurin, so verða skótaguðstænastur og skótasamkomur kring landið á hesum støðum:



Havnar kirkju, leygarkvøldið tann 22. februar klokkan 19:00.

Christianskirkjuni, leygarkvøldið tann 22. februar klokkan 19:00.

Missiónshúsið í Leirvík, leygardagin tann 22. februar klokkan 17:00.

Kvívíkar kirkju, leygardagin tann 22. februar klokkan 15:00.

Skótarnir í Suðuroynni fara til Guðstænastu í Sumbiar kirkju sunnudagin tann 23. februar.